Mai 2002

# Sálarfrøði

## C-stig

## Vallærugrein

### Endamál

**1.** Endamálið er:

a) at savna og skipa vitan um hugsan, kenslur og atferð menniskjans.
b) at skilja sálarligu menningina út frá ymiskum ástøðum og kanningarháttum við at lýsa ymiskar og broyttar menningarumstøður, ið geva eina fjøltáttaða fatan av menningarorsøkum, og
c) at nýta sálarfrøðiligu ástøðina til at skilja nútíðarmenniskjað.

### Undirvísingin

**2.1** Undirvísingin byggir á sálarfrøðina sum kunnleikalærugrein, ið er vísindaliga undirbygd. Í sálarfrøðini fæst størri innlit í, hvussu fjøltáttað menninskjað er, og hvussu normalitetshugtakið verður fatað, og gjøgnum arbeiðið við ymiskum sálarfrøðiligum ástøðum fáa næmingarnir royndir í, hvat tey ymisku ástøðini kunnu greina, og hvør menniskjafatan liggur aftanfyri.

**2.2** Við fjølbroyttum úrvali av tilfari, ástøðum og háttaløgum er málið við undirvísingini, at næmingarnir

a) fáa sær vitan um sálarligu menning menniskjans, m.a. verða samleiki, tilvitan og atferð viðgjørd,
b) fáa kunnleika um munir og broytingar í menningini og vera førir fyri at seta hetta inn í størri høpi bæði søguliga og mentanarliga,
c) fáa kunnleika um høvuðsmunir millum sálarfrøðiligar ástøðisskipanir, háttaløg og menniskjaáskoðanir og duga at nýta henda kunnleika,
d) menna evni síni at lýsa, greina og meta um sálarfrøðilig greiðsluevni og at nýta tey sálarfrøðiligu hugtøkini,
e) læra at seta sálarfrøðiliga vitan í samband við dagligu tilveruna.

### Innihaldið í undirvísingini

**3.1** Undirvísingin fevnir um kravdu økini menningarsálarfrøði, samspælssálarfrøði og ymiskleikasálarfrøði Hon skal eisini fevna um m.a. ástøði, sum taka støði í psykodynamiskari og kognitivari sálarfrøði. Samspælssálarfrøðiligar tilgongdir verða tiknar við.

Undirvísingin kann skipast í evni, so at ymisk evni kunnu lýsast úr fleiri sjónarhornum.

Undirvísingin gevur breiða ástøðiliga vitan um sálarligu menning menniskjans. Dentur verður lagdur á eitt lívsskeið.

Undirvísingin skal viðgera ymisk sløg av samspæli og týdningin av tilætlaðum og ótilætlaðum tilgongdum, t.d. í familjuni og á arbeiðsplássinum.

Undirvísingin skal viðgera, á hvønn hátt sálarfrøði lýsir, hvussu ymiskt menniskju búnast/mennast, og hvussu menningin hjá tí einstaka menniskjanum broytist. M.a. skal týdningurin av sambandinum millum persónligan og mentanarligan samleika og millum knappligar kreppur og persónliga menning viðgerast.

**3.2** Lisnar verða einar 275-325 síður.

**Próvtøkan**

**4.1** Hildin verður ein munnlig próvtøka.

**5.1** Til munnligu próvtøkuna er fyrireikingartíðin er umleið 25 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2,5 næmingar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**5.2** Próvtøkupensum fyri næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, er 225-250 síður av lisna pensuminum.

**5.3** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensumið tað sama sum lesipensum.

**5.4** Próvtøkuspurningar verða settir í tilknýti til útflýggjaða tilfarið, sum ikki hevur verið nýtt í undirvísingini, men sum tó er um somu evni. Fylgiskjøl skulu hava kelduávísing. Einstøku próvtøkuspurningarnir skulu hava í sær undirspurningar, til tess at próvtakarin fær høvi at sýna hegni sítt á ymsum stigum.

**5.5** Í dømingini verður dentur lagdur á, hvussu próvtakarin í eini fakligari samrøðu megnar

a) at greiða frá sálarfrøðiligum spurningum,
b) at bera fram sína vitan og hugsanarhátt við sálarfrøðiligum hugtøkum,
c) at greina spurningarnar við sálarfrøðiligum ástøði og háttalag,
d) at samanbera og skifta orð um sálarfrøðilig ástøði, sum hava tilknýti til útflýggjaða spurningin, og
e) at seta spurningin inn í eitt størri høpi.

**6.** Givið verður 1 próvtal. Próvtalið verður ásett við støði í eini heildarmeting.